# DUGIR TÚ AT SELJA FISK?

Dugir tú at selja fisk, er tað kanska júst tær, vit leita eftir.

Vit bjóða tær:

- eitt starv í eini fyritøku í støðugari menning
- eitt starv við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- eitt starv innan samskipan av tøku og sølu av laksi
- eitt starv innan samskipan av framleiðslu og sølu av feskum úrdráttum
- eitt starv innan kundarøkt

Til rætta umsøkjaran bjóða vit góða løn og góðar starvstreytir.

Okkara vón er:

- at tú hevur náttúrligar eginleikar sum sølufólk
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú hevur førleika innan vørumenning
- at tú hevur góðan málførleika
- at tú hevur teldukunnleika

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 441002 og tosa við Páll Gregersen.

Umsóknarfreistin er 17. mai 2000

Umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

P/F PRG Export umsetti í 1999 fyri 161 mió. Fyritøkan selur fisk til Evropeiska meginlandið og Amerika, og arbeiðir í neyvum samstarvi við framleiðsluvirkið P/F Fiskavirkið og alifelagið P/F Luna og selur allar vørurnar fyri hesi feløg.

PRG EXPORT

P.O. Box 29 · FO-510 Gøtu · Faroe Islands

Tel +298 441002 · Fax +298 441766

SANSIR TEL 355 355



NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Tiltøk í mai 2000

**Mikudagur 03.**
Ballettframsýning v/Yndi & Hair **kl. 19.30**

**Hósdagur 04.**
"Vælskapt Brek". Sangkapping.
Fyriskipari LÍV (Tryggingarfelagið Lív) **kl. 17.00**

**Fríggjadagur 05.**
Í Álandi. NORDISK ROCK. Bólkurin Taxi spælir saman við øðrum bólkum. Hetta er í sambandi við, at Nordens Institut á Álandi fyllir 15 ár **kl. 20.00**
Musikkskúlakonsert **kl. 19.00**

**Leygardagur 06.**
Musikkskúlakonsert **kl. 19.00**

**Sunnudagur 07.**
Musikkskúlakonsert **kl. 14.00**

**Týsdagur 09. mai-Fríggjadagur 02. juni**
Tiltakið v/svenskum barnabókum. Upplestur og tekning. Tiltakið verður á bygdaskúlum og í Norðurlandahúsinum

**Mikudagur 10.**
Konsert v/Sólrun Bragadóttir, Ísland, sang og E.S. Nökleberg, Svøríki, klaver. Á skránni verða norðurlendskir sangir **kl. 19.30**

**Hósdagur 11.**
Málninga- og skurðmyndaframsýningin hjá Lailu Olsen, Grønland, letur upp **kl. 17.00**

**Sunnudagur 14.**
Einmansleikurin "Hamlet" við Roger Westberg, Svøríki **kl. 16.00**

**Fríggjad. 19. Dýribiðidagur. Húsið opið sum sunnudag kl. 14.00-18.00.**

**Hósdagur 25.**
Bókmentaráðstevnan "Oceaniske Dage" -

**Leygardagur 27.**
Skaldskapurin hjá William Heinesen & Jørgen Frantz Jacobsen

**Sunnudagur 28.**
Konsert. Nigel Allcoat, Ongland, spælir klaver til stummfilmin Jeanne d'Arc **kl. 16.00**

**Norðurlandahúsið inkl. kaffistovan hevur opið yrkadagar kl. 10-18 sunnudagar kl. 14-18.**

**Broytingar kunnu koma fyri. Hoyrið tí ÚF-lýsingar og sí skránna á tekstvarpi í SVF frá s. 650**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
**Telefon 317900 • Fax 319790**
**E-mail: nlh@nlh.fo**
**http://www.nlh.fo**



*Maskinmeistaraskúlin*
Undir Krákugjógv 5
FO-100 Tórshavn • Føroyar
Tlf. +298 312661 • Fax. +298 318545

## SKEIÐ Í KØLITØKNI

**Kølitøkni 1, grundskeið**

*Innihald:* **Høvuðseindir í køliútbúnaði.**
Fordamparar, kompressarar og kondensatorar: Slag uppbygging og virkisháttur.
**Regulering og stýring av køliútbúnaði.**
Mek. og elektroniskar reguleringseindir.
**Umhvørvið.** Árin av kølievnum.

| *Fortreytir* | *Dagar* | *Kostnaður* |
|---|---|---|
| Ongar | 4 dagar, 08. mai-11. mai 2000 | Kr. 4.000,00 |

**Tilmelding í seinasta lagi 1. mai 2000 á tel. 312661 ella fax 318545**

Sosialurin - 311820



## Djóraverndarfelagið

Djóraverndarfelagið hevur 25 ára veitslu 6. mai kl. 19 í Svanga 27. Limir við maka kunnu tekna seg á tlf. 315018, 312195, 315438 og 311912. Kostnaður er 150 kr. fyri hvønn. Seinasta freist at tekna seg er mikudagin 3. mai.

**Djóraverndarfelagið**



ADC-Heilsølan
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

ARBEIÐSHANDSKAR
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA



DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192




# Seinasti skúladagur á hesum sinni

*Fríggjadagin høvdu studentar- og HF næmingar í Hoydølum seinasta skúladag á hesum sinni, og hetta máttu bilførarar á veg eftir Hvítanesvegnum ásanna fríggjamorgunin*



*Manngarður varð gjørdur tvørtur um vegin, soleiðis at bilarnir hvørki sluppu aftur ella fram*
***Mynd: Jens Kristian Vang***



*Onkur bilførari megnaði at bróta manngarðin, og í hesum føri varð samstundis koyrt á beinið hjá einum óhepnum næmingi*
***Mynd: Jens Kristian Vang***



*Fyri næmingarnar ráddi mest um at stuttleika sær*
***Mynd: Jens Kristin Vang***

JÁKUP MØRK

Bilførarar av bygd og frá hoyvíksleiðini, ið sum vanligt ætlaðu sær eftir Hvítanesvegnum á veg til arbeiði, fingu ein minni hvøkk, fríggjamorgunin.

Røðin av bilum gekk so at siga út í eitt frá vegarmótinum við Eystara Ringveg og niðan móti Mannbrekku. Eftir at ein løta var fráliðin, fekst tó greiða á, hvat var á vási. Næmingar í Hoydølum høvdu seinasta (vanliga) skúladag, og sum fastur siður er, varð nógv gjørt burtur úr hesum.

### Einki rok

Tá bilarøðirnar bert tóktust av vaksa, og eingin slapp at koyra tann vegin, sum ætlanin var, varð løgreglan boðsend á staðið. Av Politistøðini í Havn fræ私ist tó, at alt spældi eins friðarligt av, sum tað plagar at gera, og ongin orsøk var til handtøku av nøkrum slag.

Ikki tí, frá vakthavandi frætta vit, at næmingarnir als einki høvdu at gera á vegnum. Hinvegin er talan tó um eina hending, sum fyriferst hesa einu ferð um árið, so orsøk er helst ikki til at gera ov nógv burturúr.

Á myndini sæst tó, at onkur studentur fekk nakað ilt í beinið, tá tað eydnaðist einum bilførara at bróta manngarðin og sleppa sær avstað.

### Framtíðin bíðar

Fyri framman standa nú próvtøkurnar hjá næmingunum, og eftir hetta bíðar lívið við avbjóðingum av ymsum slag, bæði innan útbúgving og arbeiði, men alt hetta hugsaðu næmingarnir ikki um fríggjadagin. Tá ráddi bert um at stuttleika sær.





FAROE SEAFOOD

Fiskasølu Samtakið marknaðarførir eitt stórt úrval av fiskavørum í egnum merki til marknaðir í meira enn 30 londum. Høvuðsskrivstovan er í Tórshavn og felagið hevur dótturfeløg í Stóra Bretlandi. Fraklandi og Danmark. Føroya Fiskasøla er størsta útflutningsfelag í Føroyum við einum árligum umsetningi uppá DKK 850 mió. Fiskasølu Samtakið hevur professionel starvsfólk, ið dagliga virka í einum altjóða umhvørvi.

www.faroe.com

## KT leiðari

Fiskasølan sóknast eftir leiðara til KT deildina hjá felagnum. KT deildin hjá Fiskasøluni er mannað við einum persóni, sum hevur ábyrgd av at reka og menna nýtsluna av KT skipanum felagsins innanlands og uttanlands. Vit leggja dent á, at KT deildin við eini heildarmeting hjá felagnum í huga kann stuðla dagliga virkseminum í Samtakinum. Vit nýta MS Office, Navision Financials, NT Server, Meta Frame og onnur forrit.

**Starvið**
Starvið hjá KT leiðaranum umfatar m.a.:

- at menna KT skipanir hjá Fiskasøluni
- at leggja KT framtíðarætlanir hjá felagnum
- at reka og umsita KT útbúna
- at veita support til brúkarar innanlands og uttanlands
- at luttaka í menning av interneti og intraneti
- at arbeiða við og samansjóða ymisku forritini
- at luttaka í verkætlanum
- at gerast serkønur nýtari av Navision Financials

**Umsøkjarin**
Tú er miðvísur, samstarvshugaður, opin fyri avbjóðingum og kann arbeiða sjálvstøðugt. Vit leggja dent á, at tú hevur eina viðkomandi ástøðiliga útbúgving innan KT, umframt royndir í verki. Fiskasølan er eitt altjóða virki og tað er tí ein treyt, at tú dugir væl at orða teg á føroyskum og enskum máli.

**Vit bjóða**
Eitt avbjóðandi og sera mennandi starv í einum altjóða virki, har tú skal luttaka í orðingini av eini KT langtíðarætlan fyri alt Samtakið. Vit kunnu bjóða eftirútbúgving og eina góða løn, sum samsvarar førleika tínum.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda til Starvsfólkadeildina hjá Fiskasøluni skjótast gjørligt ella í seinasta lagi mánadagin, hin 22. mai 2000. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Arge, fíggjarstjóra, tel. 345 345. Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Føroya Fiskasøla P/F • P.O. Box 68 • FO-110 Tórshavn • Tel +298 345 345 • Fax +298 345 300 • e-mail: faroe@faroe.com